# Stolið pengaskáp funnið í Hoyvík

**Eitt pengaskáp, sum varð stolið tann 8. januar, varð í dag funnið aftur av hundapatruljuni hjá løgregluni. Skápið er rullað á sjógv, og 20.000 krónur eru horvnar**

STULDUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Sunnunáttina 8. januar var innbrot hjá AMA-Billutum í Havn, har gerningsfólkini hava brotið ein rút, og eftir hetta varð farið eftir pengaskápinum, sum hevði hjól undir sær. Tí hevur borið til at rullað skápið út úr bygninginum, men helst hava fleiri fólk verið í brotsgerðini, tí skápið, sum er 30 ára gamalt, vigar hálvtannaðhundrað kilo, og er tí tungt at lyfta upp í ein bil.

Fríggjadagin varð pengaskápið funnið í gamla umhvørvinum í Hoyvík, har tað er rullað oman av tí lítla molanum, sum er har á staðnum. Pengaskápið er sagað upp við eini sag, sum eisini varð stolin hjá AMA, og tær 20.000 krónurnar, sum vóru í skápinum saman við nøkrum skjølum, eru horvnar.

Kriminalpolitiið í Havn sigur, at tað bæði var tilvild og orsakað av drúgvum leitingararbeiði, at skápið bleiv funnið. Saman við hundum hevur løgreglan nevniliga leitað á støðum, har hugsast kann, at onkur hevur sloppið sær av við eitt pengaskáp, og kanningar vísa, at gerningsfólkini hava verið eina góða løtu á staðnum í Hoyvík, áðrenn skápið er trillað út av bryggjuni. Tí metir politiið, at skápið helst er sagað upp í gomlu Hoyvíkini.

Politiið vil fegið frætta frá fólki, sum halda seg hava sæð ein størri bil ella station car í Hoyvík um leið 8. januar, tí eins og tað skal ein stórur bilur til at koyra eitt slíkt pengaskáp, so verður sum nevnt eisini roknað við, at fleiri fólk hava framt innbrotið, av tí at skápið er so stórt og tungt.



*Tað var bæði av tilvild og orsakað av drútgvum leitingararbeiði, at pengaskápið hjá AMA Billutum varð funnið í Hoyvík fríggjadagin, sigur kriminalpolitiið í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





## HANDVERKARI / ARBEIÐSMAÐUR

**Vit sóknsast eftir handverkara, ella arbeiðsmanni við royndum innan handverk, at byrja skjótast tilber á plastframleiðsluni í Miðvági**

REPROZ

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Løn:**
- løn sambært avtalu

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrýtin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula á tel. 21 27 89 ella á dp@hdygd.fo

H DYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*Føroya Gluggi pf. og Vatnsoyra Snikkaravirki pf. eru systurfeløg, og hava felags navn og umsiting. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr plasti og timburi. Í løtuni eru vit 24 starvsfólk, harav 8 eru í plastframleiðsluni.*





**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA**

**Skrásetingarnr.:** EF 970 **KM:** 108.900
**Árgangur:** 21.07.99 **Seinast sýnaður:** 18.08.04

**Kr. 63.000,-**



**TOYOTA LANDCRUISER 3,0 D-4D LUKSUSPAKKI 1 VAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SR 821 **KM:** 50.000
**Árgangur:** 08.06.04 **Seinast sýnaður:** 08.06.04
**Viðmerkingar:** 6xCD, Alufelgur, Elrútar A+F við antiklem, Skermøkjarar, Gottir, Fartpilot, Klimaanlegg, Optitron instrument, A-TRC (avtive traction control), DAC (down assist control), HAC (hill-start assist control) o.m.a.

**Kr. 378.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DR 131 **KM:** 131.000
**Árgangur:** 22.07.98 **Seinast sýnaður:** 04.03.05

**Útgjald kr. 35.410,-** **Kr. 98.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H\B**

**Skrásetingarnr.:** HB 469 **KM:** 156.000
**Árgangur:** 25.03.97 **Seinast sýnaður:** 26.04.05

**Kr. 48.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TN 774 **KM:** 160.000
**Árgangur:** 16.08.00 **Seinast sýnaður:** 17.11.05
**Viðmerkingar:** Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD - Elrútar framman

**Útgjald kr. 40.460,-** **Kr. 115.000,-**



**KIA SPORTAGE 2,0 Bensin 4X4 Vørubilur**

**Skrásetingarnr.:** TL 334 **KM:** 86.000
**Árgangur:** 10.10.97 **Seinast sýnaður:** 06.12.04

**Kr. 35.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2,0 D-4D 3 HURÐ 4x4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** VS 984 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 24.04.02 **Seinast sýnaður:** 24.04.02
**Viðmerkingar:** Fjarstýrt sentrallás - Elrútar framman - Radio/CD

**Útgjald kr. 51.400,-** **Kr. 205.000,-**



**SKODA FABIA COMBI 1,4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SN 641 **KM:** 64.000
**Árgangur:** 26.06.02 **Seinast sýnaður:** 26.06.02

**Útgjald kr. 24.650,-** **Kr. 98.000,-**



**TOYOTA CARINA 2,0 XL T-Diesel**

**Skrásetingarnr.:** VM 271 **KM:** 122.500
**Árgangur:** 10.06.97 **Seinast sýnaður:** 07.01.04

**Útgjald kr. 24.010,-** **Kr. 68.000,-**



**SSANGYONG MUSSO TD** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DV 753 **KM:** 90.000
**Árgangur:** 28.05.99 **Seinast sýnaður:** 21.03.05

**Kr. 97.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

**Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F